Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

Advokatskrivstovan
Frúutrøð 4
Postboks 6
110 Tórshavn

**Att.: Niels W. Poulsen, adv.**

**Tórshavn 7. januar 2014**

Journal nr.: 13/00998-4
Viðgjørt: S.R

**Viðv. felags tilboð frá Magn og Effo til Statoil í Norra – tykkara mál 20130911**

Kappingareftirlitið fekk tann 9 desember fráboðan um avtalu millum P/f Effo og P/f Magn um felags veiting av olju til Statoil AS í sambandi við boring undir Føroyum. Í fráboðanini var biðið, um antin eina váttan sambært §9 ella váttan um undantøku eftir §8.

**Kappingareftirlitið hevur við heimild í §3, stk. 1, 1. pkt. í kunngerð nr. 7 frá 13. mars 2008 tikið avgerð um at vátta, at avtalan millum P/f Effo og P/f Magn um felags tilboð til Statoil AS, sambært teimum viðurskiftum, ið Kappingareftirlitið hevur kunnleika til, ikki er fevnd av forboðnum í §6, stk. 1 í kappingarlógini, og tí verður við hesum váttan sambært §9 í kappingarlógini latin pørtunum.**

Føroysku oljufeløgini hava víst á, at neyðugt er við felags boðið, tí nøgdin sum Statoil AS hevur biðið um í ár er somikið stór, at ongin av avtalupørtunum megnar at lata hana einsamalla. Nøgdin í ár er tríggjar ferðir so stór sum seinasta ár.

Í hesum sambandi vísa føroysku oljufeløgini á verandi exchange-avtalu, har feløgini samstarva um innflutning og goymslu av oljuúrdráttum. Kappingarráðið hevur loyvt hesi avtalu fyri, at goymslurnar í Føroyum skulu nýtast á mest effektivan hátt.

Exchange samstarvið fer fram á tann hátt, at feløgini læna olju frá hvørjum øðrum ímóti at rinda eitt gjald afturfyri, og feløgini skulu so fylla olju á aftur goymslurnar. Harvið vil nýtslan hjá teimum javnast yvir eitt longri tíðarskeið. Føroysku oljufeløgini vísa á, at verandi exchange samstarv kann ikki rúma ta støðu, at annað felagið veitir nøgdina einsamalt.

Føroysku oljufeløgini hava upplýst, at goymslurnar í Føroyum rúma tilsaman 2.450 $m^3$ diesel, 2450 $m^3$ bensin, og 21.000 $m^3$ av gassolju. Í hesum sambandi eru bert gassoljugoymslurnar viðkomandi. Hesar eru býttar soleiðis runt landi, at 4.000 $m^3$ eru í Suðuroy, 7.000 $m^3$ eru í Tórshavn, 4.000 $m^3$ eru í Klaksvík og 6.000 $m^3$ eru í Søldafirði. Bert goymslurnar í Søldafirði eru viðkomandi í hesum føri, tí har er útgerðarhavn.

Avbjóðingin hjá føroysku oljufeløgunum í sambandi við útboðið hjá Statoil AS er, at talan er um serligt slag av gassolju, sum tí má goymast fyri seg. Partarnir meta, at neyðugt er at brúka ein tanga á 2.300 $m^3$ burturav til hesa olju, og møguliga brúka ein tanga á 1.800 $m^3$ sum back-up.

Statoil AS skal brúka 10-12.000 $m^3$ av serligu gassoljuni í einum tíðarskeiði uppá 60 til 90 dagar. Í sama tíðarskeiði vænta føroysku oljufeløgini, at mánaðarligi eftirspurningurin av gassolju økist við 15.000 $m^3$ í sambandi við pelagiska fiskiskapin.

Flutningurin til Føroyar hevur eisini nakrar avmarkingar sum eru viðkomandi. Goymslu- og havnarviðurskifti gera, at flutningsskipini, sum flyta olju til Føroyar, ikki kunna verða størri enn, at tey taka 8.000 $m^3$. Hinvegin hevur veitarin í Noreg treytað sær, at feløgini keypa minst 5.800 $m^3$ hvørja ferð.

Skálatrøð 20 · P.O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Faroe Islands · Tel +298 35 60 40 · Fax +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

Avtalan er galdandi so leingi, sum Statoil AS borar í Føroyum, men ikki longri enn ultimo 2014. Føroysku oljufeløgini hava boða frá at verða útlit fyri fleiri boringum í framtíðini, fara partarnir heldur at byggja verandi goymslur út.

Kappingareftirlitið metir, at tann av Statoil AS umbidna nøgdin er somikið stór, at føroysku oljufeløgini, hvør í sínum lagi, ikki kunnu standa fyri veitingini, uttan at veitingin til aðrar partar av samfelagnum í hesum tíðarskeiðinum kemur í vanda.

Í lógarviðmerkingunum til § 6 í kappingarlógini stendur at: *"Tað verður ikki mett kappingaravmarkandi, um fleiri fyritøkur í sama keypsliði innan fyri eina vinnugrein geva felags boð uppá eina ávísa uppgávu, um eingin av viðkomandi fyritøkum einsamøll megnar uppgávuna (eitt nú vegna krøvini til serkunnleika (knowhow), framleiðsluorku ella fíggjarliga styrki)."*

Kappingareftirlitið metir, at umbidna nøgdin, avmarkaða goymslurúmi í Føroyum, avmarkingin í flutningsmøguleikunum, stutta tíðarskeiðið og økti eftirspurningurin eftir vanligari gassolju í sama tíðarskeiðið ger, at Effo og Magn ikki kunnu veita nøgdina av serligu gassoljuni hvør sær.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
deildarstjóri

Sigurd Rasmussen
fulltrúi